VALGREINAR

# Okkara lítla samfelag kann vendast til egnan fyrimun

**Annika Olsen**
*Valevni Fólkafloksins í Suðurstreymi*



Umboðandi tað unga ættarliðið, so umboði eg eisini hugsjónirnar um tann komandi nýggja samfelagsbygnaðin, sum verður heilt øðrvísi enn tann, sum vit hava kent til higartil. Tann digitala revolutiónin viðførur, at magtrelatiónir og -strukturar millum menniskju frá ymiskum londum, mentanum og politiskum hugsanum kunnu koma at samstarva globalt Fyritreytirnar verða gjøgnumgrípandi øðrvísi og spurningurin er tí, á hvønn hátt ynskja vit, at Føroyar skal placerast í hesum nýggja globala samfelagnum.

Tað unga ættarliðið hugsar ikki vanabundi og traditionelt, men út frá øðrum konstellatiónum, so eg vóni, at vit ungu sum í stóran mun eru ein partur av teirri nýggju tíðini eisini sleppa at forma tað samfelag, sum vit noyðast at byggja upp av nýggjum. Tí at broyta verður neyðugt. Tann gamli samfelagsbygnaðurin kann ikki nýtast í tí globala samfelagnum, sum vit eru á veg inn í, antin vit vilja tað ella ikki.

Vit eru gott nokk fái íbúgvar í Føroyum, men hvussu fáa vit bygt okkara samfelag upp, so at vit verða tungtvigandi og eftirspurgdir globalir samfelagsborgarir. Millum annað skulu vit outsourca útbúgvingarøkið, so okkara ungu fáa møguleikan at fáa tann allarbesta partin av teimum bestu útbúgvingartilboðnum hjá teimum ymisku londunum í heiminum og seta hesi saman til eina góðkenda føroyska útbúgving. Líknandi innovatiónsloysnir skulu verða á øllum økjum og kanska serliga á vinnuøkinum. Vit skulu kunnu taka/keypa besta partin frá øðrum londum, gamalt, nýtt, kreativt og seta tað saman til eitt kvalitativt høgt støði, so henda heildin gerst ósamanbernandi, júst tí hon verður tilpassað okkara samfelagstørv.

Vit mugu tora at standa fram og siga: hyggið eftir okkum, hvussu vit hava gjørt. Vit eiga at gjøgnumhugsa heilt av nýggjum, hvussu okkara politiska skipan skal verða og stýrast, so bureaukratiið, teknokratiið og tungar politiskar mannagongdir og hugsanir, sum eru eftirlíkningar frá øðrum samfeløgum ikki kvæla allan framburð í okkara samfelag. Vit eru noydd at bróta upp av nýggjum við einum nýhugsandi og óspolerdum ungdómi, sum dugir at síggja møguleikarnir í tí tøknuligi revolutiónini. Soleiðis verða vit kappingarfør í netverksamfelagnum, og ikki eftirbátur, tvs eitt samfelag, sum eingin tímur at búgva í.

Tað er tí lívsneyðugt at tosað um sambandið millum okkum og altjóðasamfelagið, og ikki drukna í tosinum um samband og loysing til Danmark.

Gott Fólkafloksval

www.annikaolsen.net

# Tá dagurin rísur

**Hendrik Thomsen**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Nú er valstríðið um at verða lokið, og tú veitst, at brátt verður alt kvirt aftur. Tú hevur enn møguleika at gera tína ávirkan galdandi, men eftir 30. apríl skal nýggj samgonga skipast, og tí er løtan komin hjá tær sum veljara at taka støðu til, hvat gagnar samfelagnum og einstaklinginum best.

Fólkið fyrst er okkara herróp til løgtingsvalið 2002.

Tað er ikki av tilvild, at Javnaðarflokkurin raðfestir fólkið fremst, tí hann hevur sín uppruna og eigur sítt lív í fólkinum í breiðastu merking.

Tað fólkið, ið sjálvt skal evna sína framtíð við atliti til medmenniskju og fyrilit fyri umhvørvi, veit, at Javnaðarflokkurin tekur avgerðir til felags gagn fyri fólkið.

Okkara hjarta liggur hjá teimum, ið ósjálvsøkin dagliga taka tøk, og hjá teimum, ið gjøgnum eitt langt arbeiðslív hava tænt Føroyum, uttan at hava fingið ta samsýning, íð náttúrliga hoyrir teimum til.

Soleiðis er eisini við teim ungu, gomlu og teimum mongu, ið onkursvegna altíð hava okkara felags umsorgan fyri neyðuni.

Verði eg valdur á Føroya Løgting, fari eg í komandi tingsetu at arbeiða fyri at gera ábøtur innan hesi øki:

Fólkaræði: Lóggávan skal hava undirtøku í fólkinum. Stór mál til dømis grundlógin, jarðarlóggávan og fiskivinnumál skulu hava dygdargóða umrøðu millum manna, áðrenn serfrøðingar orða endaligu lógina. Allir sjálvsagdir bólkar skulu hoyrast, áðrenn lógir skulu viðtakast á Føroya Løgtingi. Her verður serliga hugsað um fakfeløgini, hvørs leiklutur sum partur av fólkaræðinum skal styrkjast munandi í komandi samgongu. Størri dentur skal leggjast á, hvussu lóggávan á bestan hátt kemur at virka í samfelagsligum høpi. Fyrisitingarlógin skal broytast, so brot á hana fáa beinleiðis avleiðingar fyri viðkomandi, ið hevur ábyrgd av lógarbrotinum.

Føroya Løgting: Løgtingslimir skulu brúka alla sína orku uppá løgtingsarbeiðið og skulu í valskeiði sínum bert arbeiða á Føroya Løgtingi.

Landsumsitingin: Bygnaðurin í landsumsitingini eigur at fáast at virka væl. Starvsfólkapolitikkur landsins skal fremjast í verki. Løgmansskrivstovan skal hava størri heimildur, so almenn starvsfólk og samfelagið alt kann fáa ágóðan av almenna starvsfólkapolitikkinum. Arbeiðast skal fyri, at øll fólk í arbeiði kring landið verða tryggjað samsvarandi virðiligar arbeiðsumstøður. Størri javnvág skal fáast millum ymisku stýrini bæði víðvíkjandi málsræði og starvsfólkatilfeingi.

Barndómurin: Ein eydnuríkur og tryggur barndómur er grundarlagið undir einum samfelag í samljóði. Fyri at skapa betri umstøður hjá yngstu borgarum okkara, skulu foreldur teirra fáa lagaligari fíggjarligar umstøður. Somuleiðis skal størri dentur leggjast á at fáa almennar barnansingarstovnar við vælútbúgvnum petagokum.

Útbúgving: Fólkaskúlin skal fáast at virka eftir nýggju lógini. Undir liðini á honum skulu frískúlar fáa høvi at virka, har hetta er skynsamt. Tað er ein sjálvfylgja fyri Javnaðarflokkin, at barnaskúlin hvílur á kristnum grundvølli. Sambandið millum framhaldsskúlar, hægri lestur og vinnulív skal mennast, so næmingurin verður førur fyri at leggja sær framtíðina til rættis sjálvur.

Tjóðarmenningin: Tjóðarmenningin heldur fram. Málsøki verða yvirtikin, tá hetta er náttúrligt og fíggjarliga forsvarligt. Tað er ein sjálvfylgja fyri Javnaðarflokkin, at Føroyar eru ein tjóð.

Útheimurin: Sambandið við Danmark, Evropeiska Samveldið og útheimin annars skal raðfestast hægri til tess at økja førleikamenning, so hin einstaki kemur at fáa eitt framkomið nútíðar tilverugrundarlag.

Vinnulívið: Altjóðagerðin er fortreyt fyri vinnuligum kappingarføri og framgongd fyri útflutningin. Tað almenna má áhaldandi stuðla uppundir at menna haldgóðar verkætlanir til frama fyri føroyskar arbeiðstakarar og vinnuvirki til fjøltáttáða útflutningsvinnu.

Fiskivinnan: Altjóða umdømið hjá føroysku fiskivinnuni skal fáast aftur á beint. Hetta skal náast í samstarvi við aðrar fiskivinnutjóðir, eisini tær, ið finnast at Føroyum, um hald er í páhaldni teirra. Tilfeingis- og marknaðarrøkt eru lyklaorðini undir eini burðardyggari fiskivinnutjóð.

Arbeiðsmarknaðurin: Lønarlagið skal verða á jøvnum føti við tað í øðrum norðurlondum, so arbeiðsmarknaðurin fær hugsavnað seg um uppgávur sínar. Faklig menning og persónlig avrik skulu tryggja okkum kappingarføri. Arbeiðssteðgir vegna tilafturskomnar lønartrætir skulu ikki leggja samfelagið lamið. Arbeiðast skal fyri at fáa ónáttúrligar munir millum yrkisbólkar burtur. Ítøkiliga verður her millum annað hugsað um setanartreytir og eftirlønartreytir hjá starvsmonnum og tænastumonnum. Allur lønarmunur millum mann og kvinnu skal burtur. Eftirlønaruppsparingin skal mennast. Hin einstaki, ið sparir upp til ellisárini, skal fáa ta neyðugu upphædd aftur skattafría fyri at tryggja ellisárini, tá pensiónsaldurin er vorðin veruleiki. Arbeiðseftirlitið skal gerast meira sjónligt og fáa størri møguleikar fyri at tryggja arbeiðspláss og arbeiðsumhvørvi.

Almenna samferðslan: Samferðslan skal verða reglulig. Útjaðarin skal røkjast nógv betur. "hepnar ætlanir um privatisering av týðandi farleiðum skulu leggjast til síðis.

Samskifti: Arbeiðast skal fyri, at øll fólk skulu fáa ókeypis ella ódýra internetatgongd og teldupostskipan á jøvnum føti við bólkar, ið longu hava henda møguleika.

Almannaøkið: Almenn hjálp skal veitast, um fólk gerast sjúk og avlamin í so stóran mun, at óneyðugt skal vera hjá vanligum løntakarum at tryggja seg móti hesum. Sjúkrahúsini skulu øll hava nútímans tól og sjálvandi skulu sjúklinga-seingirnar allar nøkta nútíðartørv. Starvsumstøður - førleikamenning-íblástur- hjá røktarstarvsfólki, tað veri seg sjúkrasystrar, heilsuatstøðingar ella sjúkrahjálparar, skulu koma uppá sama støði sum í øðrum norðanlondum. Samstarvið millum sjúkrahús sínamillum og millum sjúkrahús og læknar skal fáast at virka so væl, at sjúklingurin ongantíð verður gísli í viðgerðini.

Vard størv skulu gerast, fyri at fólk heilt ella lutvíst verða før fyri og fara at hava krav uppá, at sleppa aftur á arbeiðsmarknaðin.

Fólkapensión við viðbótum og samhaldsfasti skal skal vera grundarlagið undir virðiligum ellisárum hjá øllum føroyingum.

Mentanin: Fremjanin av mentanarálitinum skal raðfestast frammaliga. Evnarík ung listarfólk skulu stuðlast so eitt breitt mentanarlív kann koma samfelagnum øllum til góðar.

Omanfyristandandi eru bert ein evarska lítil partur av tí, eg vil arbeiða fyri á Føroya Løgtingi. Tí vil eg heita á teg um at atkvøða fyri mær ella einum øðrum av valevnum Javnaðarfloksins á valdegnum.

At enda vil eg sitera trý ørindini úr sanginum hjá Maurentiusi S. Viðstein.

## *Tá dagurin rísur*

*Tá dagurin rísur og alt vaknar við,*
*vit reisast hvør í sínum lagi,*
*tá spennast tær spengur úr liði í lið*
*til stríð og til strev, so er mál hvørt og mið-*
*tað er arbeiðsins dynjandi kvæði!*

*Í fylking skal mennast várt arbeiðarlið,*
*vit stimbrast og stælast í styrki*
*at krevja vár rætt, og vit leggja tað við:*
*Vár fylking skal halda í stríð og í frið,*
*hon skal vera vár vernd og várt virki!*

*Eitt sinn rísur dagur, sól roðar í líð*
*og fold verður føgur at skoða,*
*tá renna skal upp ein glæsilig tíð,*
*tá samsýnt til fulnar er arbeiðsins stríð ñ*
*tí er óræddur framá at toga.*

Gott løgtingsval Setið X við lista C



VALGREINAR

# Vár miðstøð og borg

**Jógvan Arge**
*Valevni Tjóðveldisfloksins í Suðurstreymi*



Tjóðveldisflokkurin fer við góðum treysti til val í Suðurstreymoyar valdømi.

Hetta er okkara og alra føroyinga miðstøð og borg og her hevur flokkurin altíð verið væl umboðaður.

Suðurstreymoyingar settu flokkin sterkan inn á løgting í 1998. Tað var startskotið til fullveldiskósina.

Tit settu flokkin sterkan inn í Tórshavnar Býráð fyri góðum ári síðani, og tað var ikki minst Suðurstreymi fyri at takka, at Tjóðveldisflokkurin vann annan sessin á danatingi í fjør.

Hetta løgtingsvalið er sera umráðandi. Høvuðsspurningurin er, um fullveldiskósin skal haldast.

Í okkara hjørtum er ongin ivi. Vit vilja halda frælsiskósina.

Ein sterkur tjóðveldisflokkur á løgtingi er fremsta borgan fyri, at hendan kós verður hildin. Tí er umráðandi, at Tjóðveldisflokkurin kemur væl frá hesum valinum í Suðursteymi.

Vit kenna eisini Suðurstreym. Vit eru varug við spurningarnar, sum troka á í hesum fjølbroytta valdømi, og vit bjóða okkum fram at taka okkum av málunum.

Her er nógv lív og stórur vøkstur. Her býr eitt fólk, sum vil nakað. Tað krevur nýggja hugsan og dyggar loysnir á so at siga øllum samfelagsøkjum.

Tjóðveldisflokkurin vil á løgtingi og í landsstýri virka fyri, at fólkið í Suðurstreymi fær tær sømdir, sum tað eigur.

Vit leggja okkum eftir at fremja trivnaðarmálini, raðfesta mentan og útbúgving høgt, ansa væl eftir pengunum og eggja til eitt sunt og frælst vinnulív.

Suðurstreymoyingar á bygd og í bý: Tykkara atkvøða fær størst ávirkan, um tú setir kross við Tjóðveldisflokkin.

# Henda impotenta samgongan má rekast á dyr!

**Hans Pauli Strøm**
*javnaðarvalevni í Norðstreymi*



Eg eri fegin um, at tey samfelagsmálini, sum Javnaðarflokkurin setti fremst í valskránni, eisini komu at standa ovast í val-stríðnum, sum nú líðir móti endanum. Nú hoyra vit ikki longur hinar spotta og gera gjøldur úr hesum málunum - nei nú verður tjakast um, hvussu vit kunnu fíggja tey og seta tey í verk. T.d.

- umstøðurnar hjá barnafamiljunum, systkinarabattin í barnaansingini,
- íbúðarviðurskiftini hjá lesandi, ungum familjum og gomlum,
- bústaðar- og virkismøguleikar hjá fólki við skerdum førleika,
- fólkaskúlin og útbúgvingarmøguleikarnir hjá ungdóminum,
- tey 160 røktarheimsplássini og døgnrøktarskipanin,
- eftirlønarviðurskiftini og pensjónirnar,
- og ikki at gloyma heilsuverkið og bíðilistarnar.

**Fullveldisríkið smokkaði niður ímillum**

Uttan mun til hvussu valið endar, so vunnu vit hettar: at tað vóru júst hesi málini sum Javnaðar-flokkurin setti fremst, sum komu at standa fremst í valstríðnum. Hetta er tað man diskuterer við lív og sál - og ikki hitt lovaða fullveldisríkið. Tað er heilt smokkað niðurímillum, tí bert nøkur fá taka tað fyri fult longur. Henda samgongan og hennara fullveldispolitikkur fór í upploysing fyri einum ári síðani, tá teir ikki tordu at taka avgerðina um fullveldið og avblástu fólkaatkvøðurnar. Síðani hava teir bara hingið saman av maktstríði, klandri og skommini yvir teirra politiska impotens:

- Teir lovaðu ein serligan føroyskan heimarætt longu 1.jan.1999 - Onki úrslit.
- Teir lovaðu ein fullveldissáttmála við eini fólkaatkvøðu áðrenn árslok 1999 - Onki úrslit.
- Teir lovaðu eina føroyska grundlóg og aftur eina fólkaatkvøðu í seinasta lagi ár 2000 - Onki úrslit.
- Teir lovaðu tamarhald á danska fíggjar-eftir-litinum - Onki úrslit.
- Teir lovaðu ein búskapargrunn at orðna allar trupulleikar av blokkniðurskurðinum - Onki úrslit.
- o.s.fr.

**Hvør króna til batar varð skrykt undan neglunum á samgonguni**

Á jú, á veg út gjøgnum dyrnar fingu teir skorið blokkin niður við 366 mió, so at í 2002 verður avlopið hjá landskassanum burtur - eftir at teir í 4 ár hava dragsað fleiri danskar pengar til landið enn nøkur samgonga nakrantíð í søguni (5 mia.kr). Dugi heldur ikki at síggja tað sum eitt politiskt bragd, at teir endiliga fingið yvirtikið Skipasýnið, fyriskipað í sátt og semju av hóvligum monnum í góðum samstarvi við danskar myndugleikar. Og heilt komiskt ljóðar reypið av sokallaðu yvirtøkuni av skúlanum og sosialu forsorgina - hetta var jú aðru ferð - skúli og almannaverk vóru longu reelt yvirtikin fyri fjóðringsøld síðani! Bardagamenninir í samgonguni - tjóðveldismenninir - fingu teir nakað av skafti? Onki ! Ikki eina einastu yvirtøku. Uttan skról og klandur í ólukkumát.

Tá teir reypa av pensjónshækkingum og skattalækkingin, so er minnið hjá fólki ikki so stutt, at tey ikki vita, at tað var andstøðan, sum rak teir eftir hæli, við aftur og aftur at seta uppskot fram um pensjónshækkingar og skattalækkingar. Uppskot eftir uppskot frá andstøðuni feldu teir náðileyst. Til teir at enda vóru so kroystir, at teir noyddust at komu við onkrum, sum líktist. Veruleikin er, at hvør einasta króna, sum henda samgongan hevur latið í pensjónshækkingum og skattalækkingum er skrykt undan neglunum á teimum!

**Viðurskiftini hjá verkafólkinum skulu á dagsskrá**

Táið eg fegnist um at málini í okkara valskrá eru komin fremst í valstríðið, má eg tó harmast um at tað ikki er galdandi fyri eitt av okkara hjartamálum, nevnliga viðurskiftini hjá verkafólkinum, sum í nógvum førum standa rættarleys á arbeiðsplássunum:

- Javnaðarflokkurin vil við nýggjari arbeiðsmarknaðarlóggávu tryggja tímaløntum sjálvsøgd rættindi í setanar- og starvsviðurskiftum, og stovna ein útbúgvingargrunn fyri verkafólkið, so tey á hvørjum ári kunnu fara á eitt arbeiðsmarknaðarskeið við fullum farloyvisendurgjaldi, teimum sjálvum og vinnuni at gagni..

**Savnandi loysnin fyri sjálvstýri í ríkisfelagsskapi**

Góðu veljarar - vísi hesum samgonguflokkum durafjórðingin! Latið teir ikki sleppa framat aftur at forpesta eisini tey næstu 4 árini við fullveldisliga ørvitiskeglinum. Fjøldin av føroyska fólkinum hevur langt síðani vent fullveldinum bakið og vil heldur hava eina sjálvstýrisskipan í einum ríkissamstarvi. Javnaðarflokkurin kann savna tann politiska meirilutan at seta hetta í verk!

# Javnaðarflokkurin er vaccinan ímóti loysingarøði

**Kristian Magnussen**
*løgtingslimur og valevni fyri Javnaðarflokkin*



Aftaná kreppuna hevur saneraða høvuðsvinnan á sjógvi og landi ment seg undir best hugsandi umstøðum. Landskassin og skattgjaldarin stóðu og standa partvís enn eftir við rokningini.

Grundarlagið undir verandi framburði í búskapinum bleiv lagt áðrenn verandi samgonga fekk um stýrisvøl. Samgongan hevur sitið turt og fjálgt afturi í rong við góðum byrði og viðráki. Hon hevur ikki havt fyri neyðini at liggja bakk og skáksigla. Skiparin tørnaði inn beinanvegin og lat 1. stýrimanninum, einum skúlaðum øsara, rokkin í hond. Róðrarfólkið og tey ófullføru, eru niðri í lastini, fyri ikki at taka útsýnið. Val er spunnið, og nógv eru farin á flog í loysingarrúsi og hanga blendaði í lokkanetinum.

Byrður og rák skifta og hvørvisjónir hvørva. Túrurin er av, og samgongan er í holt við at taka nøglina úr. Hesum ætlar Javnaðarflokkurin at forða teimum í. Men, onki kemur av sær sjálvum til lønmóttakaran og til fólkið, og tess fleiri vit eru, tess sterkari kunnu vit spenna menningar- og trygdarnetið undir tí einstaka og felagsskapinum.

# Málið fyri vinnuna í Suðuroy má verða:

**Johan Dahl**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðuroy*



At allur útflutningur úr Suðuroynni avskipast beinleiðis herfrá og ikki um Havnina!

Vinnan í Suðuroy má byrja at hugsa um at gera nakað við omanfyri nevnda mál.

Mál okkara má og skal verða, at allur útflutningur okkara her suðuri verður útfluttur herfrá, beinleiðis til útheimin og ikki sum nú um Tórshavn til útheimin!!

Tað er hvørki fíggjarliga rætt ei heldur logistiskt rætt at allur útflutningurin sum nú skal fara um Havnina!!

Hvussu er við vørugjaldinum fyri hesa vøru??? Fer hon til heimbygdina har vøran kemur frá ella fer tað til Havnina??????

Kanska ávarandi myndugleikar svara hesum spurningi!!!???

Latið okkum sessast saman og loysa hendan trupulleika skjótast tilber - um neyðugt við einum farmaskipi saman við t. d. Norðoyingum, sum eisini hava stóran útflutning.

Standið saman um Suðuroynna - eisini á hesum øki!!!